# Ein Kia fyri hvørt mál

Í sambandi við heimsmeistarakappingina í fótbólti í Suðurafrika burturlutar Kia importørurin í Týsklandi ein spildurnýggjan Kia Soul fyri hvørt mál Týskland skorar í kappingini. Eingin bilur verður tó latin fyri sjálvmál og mál upp á brotsspark.

Allir týsku Kia forhandlararnir hava seðlar í sínum framsýningarhølum til kundarnar at útfylla við møguleika fyri at vinna ein Kia Soul. Kia er ein av høvuðssponsorunum av HM-kappingini.

Tá kappingin er liðug, verður drigið millum seðlarnar.

**mg**




*Kia í Týsklandi burturluta ein spildurnýggjan Kila Soul fyri hvørt mál Týskland skorar í HM*

# Fyrsta ferðsluvanlukkan í 1928

Í gjár, sunnudagin 4. juli, var minningardagur teirra deyðu í ferðsluni, sum varð hildin við at blómur vóru lagdar út á støð kring landið, har fólk hava latið lív í ferðsluvanlukkum.

Fyrsta ferðsluvanlukkan, sum kravdi mannalív, hendi í 1928, tá ein bilur við fýra fólkum fór út av vegnum við Varmakeldueiði í Eysturoy, og ein teirra doyði. Síðan tá eru eini 270 fólk deyð í ferðsluni á føroysku vegunum.



**ÓHAPP**

*Myndin er av einum av fyrstu bilunum í Føroyum, sum er farin út av vegnum og er bóltaður á takið. Sum tað sæst, vóru vegirnir sera vánaligir, tá í tíðini. Millum menninar, sum arbeiða við at fáa bilin upp á vegin aftur, sæst bilasølumaðurin Vilhelm Nielsen, sum seldi seldi Chevrolet í Føroyum. Hann er í ljósum frakka og kaskett*



*Her er bilurin komin aftur á hjólini. Eftir øllum at døma er myndin tikin við gamla Leirvíksvegin*



*Steen Hjaltalin Jensen*

## Bilradio
### hósdagin kl. 17.15

Í sendingini Bilradio á Rás2 verður vitjað hjá SHJ ATV-Import har Steen Hjaltalin Jensen í Leynum fortelur um sín innflutning av kinesiskum ATV . Eisini verður ein samrøða við Jørgen Thygesen, sum búði í Føroyum og seldi vørur til føroysku bilverkstøðini í 30 ár.


Tíðindaskrivið
ELLISAKFØR
FØ 45 Á FERÐ
11 BILAR Í FØROYUM
YAAA MAAA HAAA HJÁ EINARI
OG MANGT ANNAÐ
effo

*Tíðindaskrivið Ellisakfør er í A5 støðd við 48 blaðsíðum*

## Hvør var Rudolf Diesel?

Tíðindaskrivið Ellisakfør var í farnu viku sent út til limirnar í áhugafelagnum Føroya Ellisakfør. Talan er um 19. árgang av blaðnum, sum er í A5 støðd við 48 blaðsíðum.

Í blaðnum eru áhugaverdar greinar um tiltøk felagsins, sum t.d. túrar við bilum og motorsúkklum umframt annað søguligt tilfar. Ein áhugaverd grein er t.d. um Rudolf Diesel, sum uppfann dieselmotorin, søguligt føroyskt biltilfar hjá Hergeiri Petersen er eisini í blaðnum umframt nógv ymiskt annað.

Áhugafelagið Føroya Ellisakfør varð stovnað í 1992, og felagið hevur givið út limabløð øll árini.

Formaður í felagnum er Eirikur Ó. Simonsen. Heimasíðan hjá felagnum er: www.ellisakfor.com

*mg*